# Skerdir veiðimøguleikar í ES-sjógvi

**Fiskiveiðusamráðingar millum Føroyar og ES vóru í Havn 2. og 3. desember. Í stuttum kann sigast, at partarnir samdust um at gera eina fiskiveiðiavtalu fyri 2005, sum er á einum lægri støði enn árini framanundan. Avtalan byggir á vánaligu støðuna hjá ávísum fiskastovnum. Avtalan millum Føroyar og ES hevur annars verið á sama støði í fleiri ár**

FISKIVEIÐIAVTALA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í nýggju avtaluni fáa Føroyar eitt nú kvotur av svartkjafti, ídnaðarfiski og makreli í ES-sjógvi og kvotur av rækju, lodnu og svartkalva í grønlendskum sjógvi.

ES fiskar sum heild bert ein lítlan part av sínum kvotum í føroyskum sjógvi. Av upsa og svartkjafti verður um helvtin av teirra kvotu fiskað. Tey 500 tonsini av toski og hýsu, sum ES fær hjá okkum, verða fiskað. Kvotan av blálongu og longu undir einum, ið eisini fevnir um stinglaks og langasporl, verður eisini gagnnýtt um enn ikki til fulnar.

Eftir samráðingarnar, ásannar Fiskimálaráðið, at stovnarnir av ídnaðarfiski í Norðsjónum – hvítingsbróður og nebbasild – eru sera illa fyri. Noreg og ES sum strandarlond hava tí tikið avgerð um ikki at fiska hvítingsbróður í 2005 og at skerja fiskiskapin eftir nebbasild niður í at kalla onki. Tó at Føroyar í mong ár hava havt javnt stórar kvotur av ídnaðarfiski og rossamakreli, hevur lítið verið fiskað av hesum kvotum, eitt nú tí, at fiskiskapurin eftir nebbasild hevur svikið.

– Lodnustovnurin í grønlendskum sjógvi er eisini illa fyri. Tí hevur Grønland ikki lodnu at lata ES í komandi ári.

Fiskimálaráðið sigur, at hesar umstøður gjørdu, at tað ikki var møguligt hjá ES at lata Føroyum kvotur av hesum fiska-sløgunum í 2005.

– Men um kanningar á vári 2005 vísa, at grundarlag er fyri fiskiskapi eftir nebba-sild í Norðsjónum, verður møguligt hjá Føroyum at fáa kvotu – ímóti, at ES fær veiðimøguleikar í føroyskum sjógvi afturfyri.

Føroyska kvotan av brislingi, sum annars hevur verið roknað upp í ídnaðarkvotuna, hækkar úr 4.000 tonsum upp í 6.000 tons. Av hesum kunnu 1.200 tons verða norðsjóvarsild sum hjáveiða. Føroyar hava framman-undan ikki havt kvotu av norðsjóvar-sild frá ES.

Sum avleiðing av niðurskurðunum av føroysku kvotunum frá ES, eru botnfiskakvotur hjá ES í føroyskum eisini sjógvi skerdar.

Fiskimálaráðið sigur, at kongafiska-kvotan hjá ES verður skerd úr 6.300 tonsum niður í 4.000 tons. Haraftrat verður kvotan av flatfiski og svartkalva skerd úr 1.000 tonsum niður í 600 tons, og henda kvotan fevnir nú ikki longur um svartkalva.

– Føroyar, ES og Noregi hava sum strandarlond fyrr í heyst gjørt avtalu um at lækka heildarkvotuna av makreli í 2005 við 23% samanborið við 2004. Sum avleiðing av hesum eru kvoturnar í nýggju avtaluni millum Føroyar og ES minkaðar samsvarandi.

Føroyar kunnu tó framhaldandi fiska ein týðandi part av síni strandarlanda-kvotu í ES sjógvi.

Við nýggju avtaluni, minka veiðimøguleikarnir hjá bæði Føroyum og ES við eini 2.700 tonsum, tá ið kvoturnar verða gjørdar upp í toskavirði, men sambært Fiskimálaráðnum hava Føroyar framhaldandi eina yvirvág í avtaluni upp á eini 13%.

Í føroysku samráðingarnevndini vóru Andras Kristiansen, deildarstjóri sum samráðingarleiðari, Ulla S. Wang, fulltrúi, Jens Helgi Toftum, fulltrúi, Martin Kruse, fulltrúi, Kaj P. Mortensen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, Jákup Reinert, fiskifrøðingur, Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, Jákup Sólstein, Bjarti Mohr, Niels Jacob Nielsen, Ólavur Joensen, Atli Hansen, Jóhan Joensen, Petur H. Jacobsen og Jógvan Norðbúð, allir umboðandi Føroya Reiðarafelag. Við vóru eisini Árni Olafsson, ráðgevi í føroyskum málum í danska uttan-ríkis-ráðnum og Bo Aaborn frá Færøernes Kommando.

# ES-sáttmálin rakar meint

**– Tað er harmiligt við stóru niðurskurðunum í kvotunum. Nøgdirnar, sum vit hava fingið í okkara lut, kunnu ikki brúkast til nakað sum helst. Men var hjáveiðan, sum nú er við í sáttmálanum, loyvd í undanfarnu sáttmálum, høvdu teir verið rímiliga góðir fyri ídnaðarskipini, sigur Sørin Svenning Danielsen**



*Atlantsfariá er eitt av ídnaáarskipunum, sum veráa meint rakt av niáurskuráinum eftir n?ggja sáttmálanum millum Føroyar og ES*

*Mynd: Edvard Joensen*

FISKIVEIÐIAVTALA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sørin Svenning Danielsen, sum hevur ídnaðarskipið, Havørnina, sigur, at nýggi sáttmálin millum Føroyar og ES serliga fer at raka ídnaðarskipini.

– Men eg haldi, at størsti trupulleikin hjá hesum skipum, eru okkara egnu myndugleikar, sum ikki vilja loyva okkum at gera íløgur í frægari skip, soleiðis at vit kunnu fiska av svartkjaftakvotuni, sum vit eiga.

Sjálvur hevur Sørin Svenning sitið í rættinum, tí Havørnin, sum hann er reiðari á, hevur verið løgd undir at hava havt ov nógva hjáveiði av sild.

– Hjáveiðikvotan av sild hevur sambært landsins myndugleikum skula verið 0 (null), samstundis sum hópur av øðrum skipum á somu leiðum hava havt millum 15 og 20% av sild sum hjáveiði.

Sørin Svennnig fegnast tó um, at norðsjóvarsild nú verður loyvd sum hjáveiða í nýggja sáttmálanum.

– Somu embætismenn, sum sótu í rættinum og førdu fram, at føroysk skip ikki hava havt trupulleikar við hjáveiði í Norðsjónum, hava nú ásannað, at neyðugt er við hesi hjáveiði, um skipini skulu kunna gagnnýta síni veiðirættindi annars. Nú er tað knappliga vorðið so umráðandi, at føroysk skip skulu kunna hava eina ávísa hjáveiði av sild, sigur hann.

Hann ásannar, at nýggi sáttmálin við nýggju hjáveiðimøguleikunum er eitt framstig.

– Sjálvandi er tað harmiligt við stóru niðurskurðunum í kvotunum, tí nøgdirnar, sum vit hava fingið í okkara lut, kunnu ikki brúkast til nakað sum helst. Men var hjáveiðan, sum nú er við í sáttmálanum, loyvd í undanfarnu sáttmálum, høvdu teir verið rímiliga góðir fyri ídnaðarskipini.

Sørin Svenning vísir á tað, sum landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, hevur sagt um, at ídnaðarskipini kortini fiska so lítið av summum av teimum fiskasløgum, sum nú eru skerd.

– Men hann kundi hóskandi spurt seg, hví so hevur verið - og svarið er, at hesi fiskasløg kunnu ikki fiskast uttan eina ávísa hjáveiði, leggur hann.

Sørin Svenning Danielsen sigur, at ídnaðarskipini, sum verða hart rakt av niðurskurðunum í nýggja ES-sáttmálanum, eru Jeanne, Havhólm, Havørnin, Petina og Atlantsfarið.

– Hetta eru skipini, ið eiga rættindi sum ídnaðarskip, sigur hann at enda.

Felagið Ídnaðarskip:

# Ógreiða um formanssessin

**– Tá ið samráðingarnar við ES vóru komnar undir land, og næstan bara døgurðin var eftir, ringdi Bjarti Mohr eftir tveimum umboðum aftrat. Men tað var ikki mær, hann ringdi eftir, sigur Sørin Svenning, sum er vónsvikin av, at hann er hildin uttanfyri**

ÓGREIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir samráðingarnar, sum verið hava millum Føroyar og ES um veiðirættindi, sum serliga hava gingið útyvir møguleikarnar hjá ídnaðarskipunum, hevur ivi tikið seg upp um, hvør formaður í Felagnum Ídnaðarskip er.

Bjarti Mohr, reiðari, var við til samráðingarnar, men maðurin, sum móttekur postin hjá felagnum og hevur hildið seg verið virkandi formann, Sørin Svenning Danielsen, visti ikki av samráðingunum, fyrr enn tær vóru lidnar.

Eftir at Sørin hevur úttalað seg í ÚF um hesi viðurskifti, hevur Bjarti hildið fast um, at hann er formellur formaður í felagnum.

– Tá ið samráðingarnar vóru komnar undir land, og næstan bara døgurðin var eftir, ringir Bjarti eftir tveimum umboðum aftrat. Men tað var ikki mær, hann ringdi eftir, sigur Sørin Svenning, sum er vónsvikin av, at hann er hildin uttanfyri.

Sørin Svenning hevur annars sitið í nevndini í felagnum seinastu 2-3 árini.

Hann sigur, at fyri einum tveimum árum síðan var fundur í felagnum, har Bjarti Mohr varð valdur til formann.

– Men felagið hevur verið óvirkið, og ómøguligt var at fáa fatur á formanninum. Tí varð kallað saman til nýggjan fund, har eg og fleiri við mær tóku tað, sum eg nú var nýggjur formaður í felagnum.

Sørin Svenning sigur, at nú samráðingar skuldu vera við ES, hevur Føroya Reiðarafelag brúkt tað sambandið, sum teir hava havt, og tá hevur reiðarafelagið kallað Bjarta Mohr inn til samráðingar sum formann í Felagnum Ídnaðarskip.

– Orsøkin til, at eg úttalaði meg í ÚF, var, at limir í felagnum ikki kundu góðtaka, at Bjarti Mohr úttalaði seg sum formaður í felagnum eftir samráðingarnar. Limirnir gjørdu vart við hetta hjá ÚF, og tí varð eg biðin um viðmerkingar til málið.

Sørin Svenning ásannar, at Felgið Ídnaðarskip ikki hevur verið tað raskasta felagið til tey formellu tingini – á pappírinum, sum hann tekur til, og tí hevur hetta málið tikið seg upp.

– Eg havi óteljandi ferðir roynt at fingið fatur á Bjarta Mohr, bæði um telefonina og við telduposti, men tað hevur ikki eydnast.

Hann heldur ikki, at tað er nøkur meining í at keglast um hetta mál, men heldur, at neyðugt er at fáa hesi viðurskifti uppá pláss og fáa felagið at virka betur.

– Nú samráðingar verða í Havn, 14. og 15. desember, um sínámillum fiskiveiðirættindi við Noreg, havi eg fingið fundarboð frá Føroya Reiðarafelag – og stutt herfyri var eg eisini á fundi við løgmann fyri Felagið Ídnaðarskip.

Soleiðis, sum støðan hevur verið í Felagnum Ídnaðarskip hesi undanfarnu tvey árini, undrast hann rættiliga yvir, at hann ikki frætti um samráðingarnar við ES, fyrr enn tær vóru lidnar.

– Bjarti Mohr veit væl, hvussu støðan í felagnum hevur verið, og tí undrar tað meg, at eg einki fekk at vita um hesar samráðingar, sigur Sørin Svenning Danielsen.